# Álit og virðing aftur í føroyskan politikk

**FLOKSTING** Tjóðveldi setti frælsi og búskaparliga endurreisn sum høvuðsevni fyri flokstingið, sum flokkurin helt í Haraldsundi. - Orsøkin er, at fyri okkum hanga hesi málini óloysiliga saman, segði Høgni Hoydal í síni formansfrágreiðing

Vilmund Jacobsen

Tjóðveldi vil hava neista og glóð aftur í føroyskan politikk og vil taka við landsins leiðslu.

- Vit vilja beinanvegin fara undir at fremja ítøkilig mál, ið kunnu skapa álit og virðing aftur í føroyskt fólkaræði og politikki. Mál, sum hava beinleiðis týdning fyri fólk og vinnulív – og fyri øll, sum vilja virka og liva her.

Í formansfrágreiðing síni segði Høgni Hoydal, at Tjóðveldi vil hava skil í egnum húsi, sum hann tók til.

- Vit vilja broyta tær fastløstu skipanir, ið taka áræðið burtur frá fólki og vinnu, segði hann og legði aftrat:

### Tjóðveldi vil hava –

* Uppudding í almennu fyrisitingini. Vit krevja eina óspilta fyrisiting, har brot á rættartrygdina fáa avleiðingar beinanvegin, og har bygnaðurin verður endurskoðaður frá grundini.

* Politiska útlutingin av tilfeingi og vinnurættindum verður steðgað. Allar vinnur skulu hava javnar kappingartreytir, og fiskirættindi skulu bjóðast út.

*Fíggingar-og rentukostnaður skal minkast fyri vinnu og húsarhald. Realkredittur, Húsalánsgrunnur, lóggáva viðvíkjandi peningastovnunum og onnur átøk skulu fremjast til tess at minka um dýra kostnaðarstøðið.

*Skatta-og avgjaldsskipanirnar skulu endurskoðast. Vaksandi gjøld hava seinastu árini hækkað um skattatrýstið á flestu húsarhald og vinnur og skapa djúpri gjáir millum samfelagsbólkar.

* Føroyskur førleiki skal mennast. Íløgur og politisk átøk skulu vigast eftir, um tey menna føroyskan førleika og kappingarførið hjá føroyskum fyritøkum.

* Gjáirnar millum samfelagsbólkar og økir í landinum, skulu smalkast. Kommunurnar mugu nú leggjast saman, so vit fá økir í landinum, sum kunnu kappast í rímiligari javnvág. Samstundis má kommunuskattur og landsskattur endurskoðast.

Høgni Hoydal segði í síni formansfrágreiðing, at Tjóðveldi hevur sett frælsi og búskaparliga endurreisn sum høvuðsevni fyri flokstingið hesaferð.

- Orsøkin er, at fyri okkum hanga hesi mál óloysiliga saman, segði formaðurin í Tjóðveldi.

vilmund@sosialurin.fo



*Fleiri enn 100 fólk vóru á flokstingi hjá Tjóðveldi í Haraldssundi fríggjakvøldið og leygardagin*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*- Vit vilja broyta tær fastløstu skipanir, ið taka áræðið burtur frá fólki og vinnu, segði Høgni Hoydal*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Tey valdu loysing í Haraldssundi

**FLOKSTING** Í Haraldssundi, Koltri og Trøllanesi var 100% undirtøka fyri loysing á fólkaatkvøðuni hin 14. september. Hetta fór ikki aftur við borðinum, tá Høgni Hoydal helt sína formansrøðu á flokstingi í Haraldssundi leygarmorgunin

Vilmund Jacobsen

- Tá vit á fyrsta sinni halda floksting í Haraldssundi og á Kunoynni, er tað við stórari eyðmýkt mótvegis teirri sterku søgu og tí stóra magni, sum fólkið á hesari oyggj hevur skapað og givið okkum.

Tað segði Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, tá hann byrjaði røðu sína á flokstinginum í Haraldssundi.

- Vit verða bergtikin av hesi í miðal hægstu oyggj Føroya. Vit gerast hugdjørv og bilsin av tí lívi, sum er livað, og tí lívi, sum er mist ímillum hesi fjøll og tindar. Vit gerast errin av, at Kunoyggin av øllum oyggjum og plássum í Føroyum, hevur alið fram ta sterkastu frælsisstrembanina millum sítt fólk.

Hann vísti á, at á fólkaatkvøðuni hin 14. september 1946 atkvøddi Haraldssund 100% fyri loysing. Bert Koltur og Trøllanes megnaðu tað sama av øllum bygdum í Føroyum.

- Taka vit Kunoyar bygd, vóru 96% fyri loysing. Av øllum fólki, sum vóru á vali á Kunoynni, atkvøddu øll fyri loysing - uttan tvey, sum atkvøddu fyri stjórnaruppskotinum – og ein atkvøða varð ógildað. Úrslitið var 87-2. Eingin oyggj, ið hýsir fleiri bygdum, kann vísa á slíka undirtøku.

Í byrjanini av røðu síni segði Høgni Hoydal, at flokkurin er takksamur fyri stuðulin í hesari oyggj.

- Her bitu ikki ræðumyndir og sundurlyndi á. Tað ber helst til at siga um haraldssundsfólk, at í eini bygd, sum hevur ein tann ringasta sólargangin í Føroyum og liggur í myrkri stóran part av degnum og árinum - har sóu Haraldssundsfólk kortini ljósið, legði formaðurin í Tjóðveldis aftrat.

vilmund@sosialurin.fo



*Í Haraldssundi var 100% undirtøka fyri loysing hin 14. september í 1946*

Mynd: Vilmund Jacobsen